Landsfelag Pensjónista

Argir 24.05.2023

Almanna- og mentamálaráðið

Verður sent við telduposti til ammr@ammr.fo

HOYRINGSSVAR

Almannamálaráðið hevur sent Landsfelag Pensjónista til ummælis:

Uppskot til
Løgtingslóg um Brekumboð

Landsfelag Pensjónista tekur undir við, at Føroyar fáa eitt umboðsfólk, ið skal umboða øll menniskju í Føroyum, ið bera brek av einum og hvørjum slag.

Landsfelag Pensjónista fegnast um, at uppskotið til Nevndina fyri Brekumboðið við 5 limum og 5 varalimum, eisini skal umboða eldraøkið. Eldraøkið fevnir um eina lutfalsliga stóra nøgd av fólki, ið eru óhjálpin. Við hesi lógini fáa tey eitt tiltrongt talurør, har bæði tey eldru og teirra avvarandi kunnu gera vart við teirra støðu.

Orðingin í § 8. stk. 3. kundi verið orðað eitt sindur greiðari fyri at ongin misskiljing skal verða, nær nýggir limir verða valdir annað hvørt ár:

Uppskot:
§ 8. stk. 3. Limirnir verða settir fyri fýra ár í senn. **Eftir hetta verða** ávikavist tveir og tríggir limir valdir annað hvørt ár.

Vinarliga

v. Landsfelag Pensjónista

Beate L. Samuelsen, forkvinna